# Teknikarin leggur taktikkin

**Eftir at hann í fjør var leikandi hjálparvenjari, hevur Jens Erik Rasmussen í ár tikið fetið upp sum venjari hjá vágamonnum, sum við styrktum vónum nú aftur royna seg í bestu deildini**

Jákup Mørk

Verður tosað um tekniskt dugnaligar leikarar, hava føroyingar átt fáar, sum røkka sáma støði sum Jens Erik Rasmussen. Bóltsnillingurin úr Miðvági, sum umframt royndirnar í Vágunum, eisini hevur leikt í Danmark og Íslandi, umframt nøkrum føroyskum feløgum. Alla staðni við dentinum á somu uppskriftina. Nevnliga skjótan fótbólt, sum eisini skal vera stuttuligur at hyggja at.

Fyri einum ári síðani gekk leiðin tó heimaftur. Ævintýrið á íslendska Ólafsfirði gekk ikki so væl, sum tey flestu høvdu vónað, og hetta merkti millum annað, at føroysku leikararnir hjá felagnum allir settu kós heimaftur.

Hóast hann ivaleyst eisini kundi fingið fótbólt í bestu deildini, so valdi Jens Erik Rasmussen tó at fara aftur til røtur sínar. Vágamenn vóru júst farnir niður í aðru deild, men har vóru greiðar ábendingar um, at hesin steðgurin skuldi vera heilt stuttur. Jens Erik tók av, tá honum stóð í boði at gerast hjálparvenjari hjá liðnum, og ikki kann sigast annað, enn hetta gekk væl, soleiðis sum liðið mest sum einaráðandi vann seg úr deildini.

## Ikki heilt nýtt

Í ár er tó talan um eina øðrvísi avbjóðing, og ikki minst fyri Jens Erik er talan um stóra avbjóðing. Albert Ellefsen, sum annars skuldi verða venjari hjá liðnum, fekk ikki hetta at sampakka við borgarliga starvið á Fiskavirking, og tí stóðu vágamenn brádliga á berum.

Leiðslan fekk tó sett nýggjan venjara, tá Jens Erik tók av møguleikanum, sum stóð honum í boði. Og sjálvur sigur hann, at hann ikki var í iva, tá hesin kom.

– Tað er jú ikki heilt nýtt fyri mær. Eg var jú hjálpari hjá Albert í fjør, so eg kenni til ymsu leikararnar, og tað er heldur ikki soleiðis, at eg nú brádliga standi einsamallur við øllum. Jonhard Joensen er settur afturat mær, og Rói Árting hevur eisini hjálpt til, so tað er kanska heldur so, at vit eru ein bólkur, sum hevur ábyrgdina av venjingini, og higartil haldi eg, at hetta hevur riggað heilt væl.

## Sterkt lið

Eitt er, at venjingarnar rigga væl, men tað nyttar lítið, um hetta ikki eisini sæst aftur á vøllinum. Nakað sum Jens Erik tó ikki ber ótta fyri á nakran hátt.

– Eg haldi í øllum førum, at tað liðið, sum vit hava í dag, er eitt tað sterkasta, sum felagið nakran tíð hevur havt. Talan var sjálvandi eisini um eitt sterkt lið, sum gjørdist nummar fimm í ’95, men síðani tað er í øllum besta vágaliðið, sum eg havi sæð.

– Kanska er tað ein vansi, at vit koma beinleiðis úr aðru deild, men nú hava leikararnir so nakrar steypadystir at venja seg við ferðina, og teir flestu hava jú roynt seg áður í bestu deildini, so tað skal nokk koma.

Og Jens Erik leggur eisini aftur, at hetta merkist í áhuganum kring liðið. Spenningurin upp til dystirnar er nógv størri, enn hann vanliga hevur verið, og yvirhøvur man tað vera stuttligari hjá fótbóltinum í Vágoynni í ár, enn tað so ofta hevur verið.

– Vit skulu tó ikki seta okkum nøkur órealistisk mál, heldur Jens Erik tó, tá vit spyrja, hvussu langt hann heldur, at liðið kann røkka. Fyrst og fremst skulu vit stabilisera okkum í deildini, og bara tað kann gerast trupult. Verður sæð burtur frá einum tveimum-trimum feløgum, so tykist fyrsta deild í ár sera jøvn, og eitt nú haldi eg ikki, at tú við vissu kanst peika á nakran niðurflytara.

– Tí verður málið hjá okkum at halda okkum omanfyri teir báðar niðastu sessirnar, og so er alt omanfyri nummar átta at rokna sum bonus. Sjálvandi vóna vit, at vit kunnu klintra nakað uppeftir, men fara vit at droyma um heiðursmerki longu nú, so kann skjótt enda galið, heldur hann.

## Vil frameftir

Og at enda avdúkar Jens Erik eisini, at hann saman við venjarafeløgum sínum har vesturi telist millum teirra, sum vilja hava nakað at henda á fótbóltsvøllinum.

Í øllum førum skal ikki roknast við, at talan verður um eitt FS Vágar, sum bara fer at spæla verjufótbólt í royndunum at halda sær í deildini.

– Nei, har verður fyri tað mesta spælt 4-4-2. Eg skal ikki siga, at vit onkuntíð taka ein áleypara nakað aftur, tá vit á útivølli spæla móti einum sterkum liði, men tað verður alla tíðina við fýra í verjuni. Tað spældu vit í alt fjør, so leikararnir kenna til hetta, og eg eri sannførdur um, at vit í longdini vinna mest við hesum, sigur leikandi venjarin hjá FS Vágum.

Hann er teknikarin, sum nú eisini skal leggja taktikkin hjá sínum liði.



*– Vit skulu ikki seta okkum nøkur órealistisk mál. Fyrst og fremst skulu vit stabilisera okkum í deildini, og bara tað kann gerast trupult. Verður sæð burtur frá einum tveimum-trimum feløgum, so tykist fyrsta deild í ár sera jøvn, og eitt nú haldi eg ikki, at tú við vissu kanst peika á nakran niðurflytara, sigur Jens Erik Rasmussen.*

Mynd: Álvur Haraldsen






